Starvslýsing

# MÓTTØKUFÓLK TIL HOTEL HAFNIA



**Hotel Hafnia søkir eftir fólki til móttøkuna at byrja skjótast gjørligt.**

**Um teg:** Tú hevur viðkomandi útbúgving ella royndir, og fyrimunur er at hava grundskeiðið „Jord til bord". Tú dugir væl enskt og norðurlendsk mál í talu og skrift, hevur góðan teldukunnleika og eitt ávíst innlit í roknskap. Tú ert fyrikomandi, vísir ábyrgd og dugir at arbeiða undir krevjandi umstøðum.

**Um starvið:** Talan er um eitt sjálvstøðugt og fleksibult starv við góðum arbeiðsumstøðum, har tú veitir tænastu á høgum stigi í einum altjóða umhvørvi. Arbeiðið er skipað í fjølbroyttar vaktir, har tú skiftir millum at arbeiða um dagin, kvøldið og vikuskiftið.

## Umsóknir

Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, send okkum so eina umsókn við avritum av prógvum og ummælum til sunniva@hafnia.fo ella til Hotel Hafnia, att.: Sunniva Arge, Áarvegur 4-10, 100 Tórshavn.

**Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at ringja til móttøkuleiðaran, Sunnivu Arge, tel. 31 32 33.**

Hotel Hafnia ★★★★

Áarvegur 4-10 • Postsmoga 107 • FO-110 Tórshavn • Tel +298 31 32 33 • Fax +298 31 52 50
hafnia@hafnia.fo • www.hafnia.fo

SENDISTOVAN



liv.fo

# Vælkomin til eitt nýtt LÍV

**Stig 1: Vit taka okkum av tínum pensjónspappírum**
- so kanst tú lesa tey, tá ið tú vilt

Pensjón er nakað, ið skal vera í tryggum hondum, uttan at tær nýtist at gera nakað hóvasták. Vit hava sett okkum fyri at geva kundum okkara betri innlit í, hvørji útlit teirra eru. Tí eru vit farin undir eina tilgongd, ið stigvíst ger tað lættari hjá tær at fáa yvirlit yvir tína pensjón.

Í fyrsta stigi hava vit lagt tíni pensjónspappír út á okkara kundaportal. Harvið sleppur tú undan at hava skjølini í tjúkkum ringbindum. Ístaðin fert tú inn á liv.fo og fært lættari, skjótari og betri innlit í, hvussu tín pensjón er skipað. Alt er lagt fram – lætt og greitt.

| Stig 1 | Stig 2 | Stig 3 | Stig 4 | Stig 5 |
|---|---|---|---|---|
| Kundaportalur | Seniorskipan | Marknaðarrenta | Frítt íløguval | Pensjónsnýskipan |

Innlit í útlit LÍV